# ítróttur

Nr. 12 • mánadagur • 17. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


## Topp-dómarar til klassikaran

**Tað verður eitt tað sterkasta danska dómaraparið, sum skal leiða dystin, tá VÍF og Kyndil tørna saman seinast í hesum mánaðinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jørn Møller Nielsen og Gert Aagaard, sum koma til Føroya tann 27. januar, hava báðir sera drúgvar royndir innan hondbóltsdøming. Báðir hava teir virka í fremstu røð í Danmark í fleiri ár. Tað var tó ikki fyrr enn í 2004, at teir gjørdust fastir makkarar á vøllinum, men kortini hevur frá fyrsta dystinum gingið sera væl. Somikið væl, at teir í fjør vóru mettir sum besta danska dómaraparið.



*Talan verður um altjóða døming, tá VÍF og Kyndil hittast í Vestmanna seinast í hesum mánaðinum*

### Hittust í Nøvling

Tað er føroyska dómarafelagið, sum hevur boðið teimum báðum dønunum upp, og sum við so nógvum slíkum vitjanum, so kom hetta í lag mest sum av tilvild. Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen, sum eru nýggja altjóða dómaraparið hjá føroyingum, dømdu í summar í danska Nøvling Cup, og her komu teir í samband við danska parið.

– Vit tosaðu saman um leyst og fast. Tá vit so tosaðu um at fáa teir upp at døma onkran dyst, vóru teir alt fyri eitt fúsir, og síðani hava vit roynt at arbeiða við hesum, sigur Eyðun Samuelsen, sum umframt dómaraleiklutin eisini er ein av oddamonnunum í føroyska hondbóltsdómarafelagnum.

### Gevur íblástur

Hann sigur víðari, at teir avgjørt rokna við, at ein slík vitjan kann geva føroyskum dómarum íblástur. Og tí hava teir eisini lagt vitjanina til rættis, soleiðis at heimligu dómararnir eisini kunnu fylgja við í dømingini.

– Talan verður sum so ikki um nakað skeið. Men vit koma at síggja, hvussu eitt slíkt par fyrireikar seg til dyst. Ætlandi skulu vit føroyingar so fungera sum eitt slag av eygleiðarum undir dystinum, og eftirfylgjandi skulu vit so »eksaminera« teir. Hetta skilt soleiðis, at vit tá hava eina spurnarrundu, har føroysku dómararnir snøgt sagt kunnu gjøgnumhegla donsku gestirnar við spurningum og viðmerkingum um dømingina.

Sambært skránni skal dysturin millum VÍF og Kyndil spælast sunnudagin 29. januar. Ætlandi verður hesin nú fluttur, soleiðis at spælast kann leygardag. Á tann hátt skuldi møguleiki fyri at føroysku dómaraþørini øll hava møguleika at fylgja dystinum, og í aðrar mátar at taka lut í dómaravirkseminum kring hendan.

## Fimm feløg eiga UEFA-liðið

**Milan, Barcelona hava hvør tríggjar spælarar á ársins UEFA liði, Chelsea hevur tveir spælarar og venjaran**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

UEFA hevur fimta árið á rað latið tey vitjandi á heimasíðu síni atkvøtt um ársins UEFA lið. Háлv onnur millon vitjandi hava atkvøtt, og einans fimm lið eru umboðaði á endaliga liðnum. Eitt nú eru lið sum Arsenal, Manchester United og Real Madrid als ikki umboðaði.

Venjari hjá liðnum er Chelsea venjarin José Mourinho. Undir sær hevur hann tríggjar AC Milan leikarar, tríggjar Barcelona leikarar, tveir Chelsea leikarar, tveir Liverpool leikarar og ein úr Juventus.

Heimsins besti leikari Ronaldinho og nummar trý í heiminum liðfelagin Samuel Eto'o eru á liðnum, men nummar tvey í heiminum Frank Lampard verður ikki nevndur. Ársins málmaður seinastu árini Buffon úr Juventus hevur mist sítt pláss til unga kekkan í málinum hjá Chelsea Petr Cech. Einasta umboði hjá Juventus er Pavel Nedved.

**Liðið sær soleiðis út:**
Petr Cech (Chelsea)
Cafu (Milan)
John Terry (Chelsea)
Carles Puyol (Barcelona)
Paolo Maldini (Milan)
Luis García (Liverpool)
Steven Gerrard (Liverpool)
Ronaldinho (Barcelona)
Pavel Nedved (Juventus)
Samuel Eto'o (Barcelona)
Andriy Shevchenko (Milan)

## Karsten er nú ÍF´ari

Klaksvíkingurin, sum eisini áður hevur spælt við ÍF, hevur gjørt sáttmála fyri komandi kappingarárið

Stutt fyri nýggjár skrivaði sportalurin, at alt bendi á, at Karstin Joensen fór at standa í ÍF-málinum í 2006.

Nú verða tíðindini so váttað, og við hesum hava fuglfirðingarnir tryggjað sær málverja til kappingarárið. Karstin spældi eisini við ÍF í 2004. Í fjør var hann aftur í KÍ, men har eru nú tveir aðrir málverjar at kappast við, og tí hevur Karstin tikið ÍF framum í ár. Ikki minst, tí ÍF eisini hevur boðað frá, at tey hava sóknast eftir einum málverja.

**-mørk**

## Borðtennis-úrslit

BORÐTENNIS
*tíðindaskriv*

3 av 5 Grand Prix umførum varð spælt í ítróttarhøllini í Trongisvági um vikuskifti, har einir 80 spælarar kappaðust. Kappast varð í 11 bólkum við 6-8 leikarum í hvørjum bólki.

**Bólkavinnararnir gjørdist:**
A Fríði Jensen, TBF
B Sigurð Carlsson, Tór
C Kai Roest, TBF
D Teitur Justinussen, TBF
E Rasmus Potts, TBF
F Tórur Dahl, Tór
G Jarmund Mikkelsen, TBF
H Bjarki Olsen, Tór
I Andrias Olsen, Tór
J Allan Petersen, Tór
K David Mortensen, TBF

**Samlaða støðan eftir 3 Grand Prix umfar er:**
**Smápinkur:**
1 Anna Mikkjalsdóttur, TBF - 230 stig
2 Eva Wilhelm, TBF - 194 stig
3 Lív Øster, TBF - 186 stig
3 Sofía Maria Ferjá, TBF - 186 stig

**Smápiltar:**
1 Hans Jón Jacobsen, TBF- 230 stig
2 Eyðfinnur Jensen, TBF - 206 stig
3 David Mortensen, TBF - 163 stig

**Pinkur:**
1 Femja Mortensen, TBF - 252 stig
2 Birita Mortensen, TBF - 248 stig
3 Súsanna Bærensen, TBF - 210 stig

**Piltar:**
1 Rasmus Potts, TBF - 600 stig
2 Heini Mortensen, TBF - 560 stig
3 Patrikk Johannesen, TBF - 360 stig

**Smágentur:**
1 Rakul Mikkjalsdóttur, TBF - 770 stig
2 Sheila Strøm, TBF - 620 stig

**Smádreingir:**
1 Fróði Jensen, TBF - 1150 stig
2 Jákup Thomasen, TBF - 910 stig
3 Jónhard Ferjá, TBF - 870 stig

**Gentur:**
1 Susie Midjord, TBF - 940 stig
2 Joan Thomasen, TBF - 690 stig
3 Svanna Mortensen, TBF - 388 stig

**Dreingir:**
1 Reidar Luid, Tór - 1370 stig
2 Pætur Albinus, Tór - 1170 stig
3 Sjúrður Ferjá, TBF - 1060 stig

**Kvinnuunglingar:**
1 Marin í Dali, TBF - 800 stig
2 Mariann Mikkjalsdóttur, TBF - 550 stig
3 Eydna Jespersen, TBF - 410 stig

**Mansunglingar:**
1 Ragnar Egilsson, Tór - 1360 stig
2 Sigurð Carlsson, Tór - 1240 stig
3 Levi Winther, Tór - 730 stig

**Meistaradeildin:**
1 Fríði Jensen, TBF - 1420 stig
2 Vagnur Nolsøe, TBF - 1200 stig
3 Petur Niclasen, TBF - 970 stig